Umsett úr donskum. Í ivaspurningum verður víst til donsku upprunaútgávuna.
https://www.folketingstidende.dk/samling/20231/redegoerelse/R6/20231_R6.pdf

Frágreiðing frá (Lars Løkke Rasmussen) uttanríkismálaráðharra 12. oktober 2023

# Frágreiðing

um

## samstarvið í Arktis

(Skrivlig frágreiðing)

### 1. INNGANGUR

Endamálið við frágreiðingini er at kunna Fólkatingið um ítøkiligu avrik Kongsríki Danmarkar í Arktis síðani síðstu frágreiðing við serligum denti á týdningarmestu tilburðirnar og úrslitini í mun til altjóða arktiska samstarvinum seinasta árið. Frágreiðingin virkaði til 2021 sum ein frágreiðing um arktisku ætlan Kongsríkisins 2011-2020. Tað er ikki enn nøkur nýggj felags Arktis-ætlan tøk fyri Kongsríkið.

Á fundi í Uttanríkis-, Trygdar- og Verjupolitisku Sam-starvsnevndini 6. juni 2023 varð komið til, at arbeiðið við einum felags grundarlagi fyri Arktis-politikki Kongsríkisins verður byrjað, tá tikið er undir við uttanríkispolitisku ætlanini hjá Grønlandi (Føroyar fingu nýggjan dagførdan arktiskan politik á heysti 2022) soleiðis, at ein felags undirtøka kann vera tøk í góðari tíð, áðrenn Kongsríkið yvirtekur formans-skapin í Arktisráði í mai 2025.

Virkni, ið viðvíkir viðurskiftum millum Danmark og ávikavíst Grønland og Føroyar, verður viðgjørt í árligu frágreiðingini hjá stjórnini um ríkisfelagsskain (R11/2023). Samstundis er lagt upp fyri, at frágreiðingin hjá stjórnini um norðurlendska samstarvið (R2/2022), eisini viðger evni, ið hava samband við samstarvið í Arktis.

### 1.1 Gongdin í Arktis sum heild

Innrásin hjá Russlandi í Ukraina 24. februar 2022 broytti grundleggjandi fortreytirnar hjá altjóða samstarvinum um Arktis. Beint eftir innrásina avgjørdu tey sjey samsintu arktisku ríkini (øll limaríkini í Arktisráði uttan Russland) at steðga við samstarvinum í Arktisráði. Í juni 2022 avgjørt at halda fram við avmarkaðum verkætlanarsamstarvi, har Russland ikki luttekur. Harafturat eydnaðist tað á einum tykisligum embætismannafundi 11. mai 2023, har Russland eisini luttók, at avhanda formansskapin frá Russlandi til Noreg. Enn er óvist, hvørjum virkisstigi Arktisráð fer at virka undir norska, og síðani formansskapi-num hjá Kongsríkinum Danmark.

Spenta støðan í viðurskiftunum við Russland ávirkar eisini máttin í Arktis. Trygdarstøðan í Arktis er óbroytt eftir innrás-ina hjá Russlandi í Ukraina. So

avgjørt viknar Russland hernaðarliga orsakað av krígnum í Ukraina, men hernaðar-megin hjá Russlandi í Arktis er í stóran mun óskalað. Sum heild ger støðan Russland til ein meira óforsagnarligan virkandi – eisini í Arktis. Tí er langskygda trygdarpolitiska støðan í økinum ógreið. Russland hevur seinastu árini útbygt hernaðarmegina hjá sær í Arktis. Útbyggingin verður mett at vera av verjuligum slag, men inniheldur í vaksandi mun partar, ið kunnu nýtast í álopsligum virksemi. Tráanin eftir lágspenningi er við tí enn undir trýsti, men verður saman við meginreglunum í Ilulissat-yvirlýsingini um frið, samskifti og samstarv í galdandi altjóða spælireglum horrnasteinurin í Arktis-politikkinum hjá Kongsríkinum.

NATO hevur orsakað av tí trygdarpolitisku gongdini økt eftirsketni við Arktis. 'Høga Norður' varð seinast tikið fram í almennu fráboðanini á NATO-toppfundinum í Vilnius í juli 2023. Toppfundarfráboðanin í Vilnius staðfestir eins og strategiska ætlanin hjá NATO frá 2022, at evnini hjá Russlandi at órógva styrkingar- og veitingarkervið hjá teimum sameindu og frælsa siglingin um Norðuratlantshav er ein strategisk avbjóðing hjá ríkjasamgonguni. Nýggi limaskapurin hjá Finnland og tann komandi hjá Svøríki í NATO fer at stimbra um møguleikarnar at samskipa og samstarva í Norðanlondum. Tá Svøríki gerst partur av Ríkjasamgonguni, fara sjey av otta av arktisku ríkjunum at vera NATO-limir.
Kongsríkið tekur áhaldandi saman við okkara sameindu støðu til nýggju megina og trygdina í økinum. Danmark fer við nýggju verjusemjuni í samstarvi við Grønlandi og Føroyum at bøta um eftirlitið og yvirvaldsverjuna í Arktis umframt at stuðla uppgávvloysnina hjá næstu sameindu og NATO í økinum. Harumframt verður arbeitt við átøkum, ið skulu minka um vandan fyri misskiljingum og ótilætlaðari øking við m.a. at styrkja karmar og mannagongdir í kunningarsamskifti. Samstundis er samstarvið millum Grønland, Føroyar og Danmark styrkt gjøgnum Uttanríkis-, Trygdar- og Verjupolitisku Samstarvs-nevndina.

Í eitt áramál hevur alsamt vaksandi altjóða áhugi verið í Arktis, orsakað av mongu avbjóðingunum og møguleikunum í økinum. Teir eru har uttan mun til avleiðingarnar av krígnum í Ukraina og leggja dent á, at tað hóast avleið-ingarnar er stórur – og alsamt vaksandi – tørvur á altjóða samstarvi. Enn er galdandi, at hitalagið í Arktis nú ornar meira enn tríggjar ferðir skjótari enn alheimsmiðaltalið. Økingar, sum longu eru sera týðiligar í vistskipanum og lívmargfeldi, og sum í størri og størri mun ávirka arktisk samfeløg og upprunafólk við avleiddum stórum krøvum til tillagingarevni. Gjøgum seinastu árini eru permafrosttáning og náttúrueldar alt meira vanlig. Veðurlagsbroytingar gera samstundis Arktis meira atkomuligt. Tað gevur handilsligar møguleikar, m.a. nýggjar siglingarleiðir og ráevnaútvinning. Hesir nýggju møguleikar kunnu hava neiligar avleiðingar m.a. í mun til arktiska umhvørvið umframt til øtan tørv á sjóbjarging (Search and Rescue).

## 2. ALTJÓÐA SAMSTARV UM ARKTIS

### 2.1 Arktisk Råd og overdragelse af formandskabet fra Rusland til Norge den 11. maj 2023

Russiska innrásin í Ukraina 24. februar 2022 setti ein bráð-an enda á samstarvið í Arktisráði við neyðugu avgerðini um at steðga samstarvinum.

Arktisráð hevur síðani stovnanina 1996 gjørt lít fyri seg sum høvuðsmótið til altjóða samstarv í Arktis. Steðgurin í Arktisráði hevur lagt eitt tómrúm eftir seg í samskipanini og samskiftinum um arktiskt viðurskifti. Hetta geldur ikki minst íbúgvarnar í Arktis, við tí felagsskapirnar upprunafólkunum, sum m.a. eru uppi í verkætlanarsamstarvinum hjá Arktisráði um viðurskifti av týdningi fyri íbúgvarnar í Arktis. Harafturat kemur tað viðurkenda arbeiðið við at kortleggja veðurlags-broy-

tingar og ávirkan teirra á Arktis (m.a. nýtt í frágreiðing-um frá ”Intergovernmental Panel on Climate Change – IPCC”) og at verkseta økisligu virkisætlanina viðvíkjandi havburturkasti, við tí plastikki.

Í juni 2022 varð avgerð tikin um eina avmarkaða upp-afturtøku av ávísum pørtum av verkætlanarsamstarvinum um verkætlanir, har Russland ikki er uppií. Síðani eydnaðist tað at avhenda formansskapin frá Russland til Noreg á fundi í Arktisráði 11. mai 2023, har øll átta ríki og umboð fyri tey seks upprunafólkini vóru við. Frá Kongsríkinum luttóku Grønland, Føroyar og Danmark. Fundurin varð hildin tykisligur og á embætismannastigi millum so nevndu Senior Arctic Officials. Við tí var fundurin øðrvísi enn vanligur ráðharrafundir, ið vanliga hátíðarhalda skiftið frá einum formansskapi til ein annan. Undir norskum formansskapi fer støða av og á verða tikin til møgleikarnar fyri at fremja virksemi, sum er í samsvari við meginreglurnar, sum arktisku samsintu ríkini eru samd um at fylgja.

## 2.2 Fyribyrging av óskipaðum fiskiskapi í Íshavi

Saman við Kanada, ES, Íslandi, Japan, Kina, Noregi, Russlandi, Suðurkorea og USA hevur Kongsríkið Danmark, tí viðvíkjandi Grønland og Føroyar, gjørt altjóða bindandi avtalu, sum skal tryggja, at tað ikki verður fiskað í altjóða hásjóøkinum í Íshavi, áðrenn nóg stórt vísindaligt grundarlag er fyri burðardyggum fiskiskapi. Avtalan varð gjørd í nov-ember 2017 og kom í gildi 25. juni 2021. Sum liður í at verk-seta avtaluna hava partarnir fingið eitt vísindaligt samstarv í lag, við tí ætlanina Joint Program of Scientific Research and Monitoring (JPS-RM). Henda ætlan skal geva avtalu-felagunum vísindaliga ráðgeving, m.a. har upprunafólk eru uppií og við teirra vitan og staðbundnari vitan. Í minsta lagi skal annað hvørt ár fundur haldast í COP (Conference of the Parties), men í verksetanartíðarskeiðnum eru fundirnir tó oftari. Suðurkorea var COP1-vertur í november 2022 og COP2-vertur í juni 2023. COP3 verður somuleiðis í Suðurkorea í juni 2024. UK, ICES og WWF luttaka sum eygleiðarar. Harumframt hittast avtalufelagarnir av og á i arbeiðsbólkum tykisliga og á veruligum fundum.

## 2.3 ES

Evropa-Nevndin og Felags Uttanríkistænastan hjá ES almannakunngjørdi 13. oktober 2021 eina felags fráboðan um forraðfestini í framtíðarliga Arktis-politikkinum hjá ES. Ein viðgerð av Arktis-politikkinum hjá ES í Ráðnum varð tó freistað orsakað av, at Russland gjørdi innrás í Ukraina, og nú er óvist, nær Arktis-politikkurin verður tikin upp til orðaskifti í Ráðnum.

Í fráboðanini løgdu Evropa-Nevndin og Felags Uttan-ríkistænastan dent á viðurskiftini við Grønland og Føroyar, ið vilja hava tættari samstarv við ES. ES vil m.a. stimbra virk-semið í Grønland við eini nevndarskrivstovu í Nuuk. Í tí sambandi fer samskifti fram millum stjórnina, Naalak-kersuisut og ES-Nevndina.

## 2.4 Arktiskt samstarv í norðurlendskum høpi

Arktiska samstarvsætlanin hjá Norðurlandaráðharra-ráðnum ”Burðdygt Arktis” fyri 2022-2024 hevur sum undanfarin ár burðardygga menning sum høvuðsmiðdepil. Í 2023 umfevndi arktiska samstarvsætlanin eina opna peninga-nøgd upp á 7,3 mió. kr. Harafturat kemur ein (afturlatin) peninganøgd til politiskar raðfestingar upp á 2 mió. kr., sum verður býtt seinni. Úr opnu peninganøgdini varð veittur stuðul til 18 verkætlanir innan eitt fjølbroytt øki eins og heilsa, undirstøðukervi, ferðavinnu, umhvørvi og veðurlag. Fyri allar verkætlanirnar geldur, at staðbundnir stovnar eru nógv uppií.

Fróðskabarsetrið í Grønlandi, Ilisimatusarfik, yvirtók 2022, í samstarvi við Norðurlandastovnin í Grønlandi (NAPA), uppgávuna at vera fyrisitingarstovnur

hjá opna umsøkjara-umfarinum undir arktisku samstarvsætlanini. Fyrisit-ingar-stovnurin flutti við tí úr granskingarmiðdeplinum Nordregio í Stokk-hólmi til Grønlands.

## 3. SERLIG ÁTAKSØKI

### 3.1 Uppgávuloysnin hjá verjuni í Arktis

Trygdarpolitiska huglagið í Arktis er merkt av harðnaðu altjóða støðuni eftir, at Russland gjørdi innrás í Ukraina, sum eisini fer at seta nýggj krøv til uppgávuloysnina hjá Verjuni í Arktis. Málið er enn, at økið heldur á at vera eitt lágs-penning-arøki. Í tøttum samstarvi við Grønland og Føroyar fer stjórn-in við tí sum setning at stimbra yvirræðihandhevjanina og eftirlitið í økinum.

Stjórnin og Naalakkersuisut gjørdu 2023 eina rammuav- talu um framtíðarligu nýtsluna hjá Verjuni av floghavnini í Kangerlussuaq eftir, at atlantsflúgvingin varð flutt frá Kangerlussuaq til Nuuk og Ilulissat. Avtalan er ein endur-váttan av grund-regluavtaluni frá 2019, sum m.a. staðfestir, at floghavnin enn skal kunna nýtast til bæði hernaðarliga og vanliga flúgvning og framhaldandi vera grønlendsk ogn. Við avtaluni er karmurin settur til eitt greiningararbeiði, ið skal vera grundlag fyri, at tað 2024 kann gerast ein donsk-grønlendsk avtala um framhaldandi nýtsluna hjá Verjuni av flogbeytini í Kangerlussuaq eftir, at tær nýggju vanligu atlantsfloghav-nirnar í Nuuk og Ilulissat lata upp.

#### 3.1.1 Verjusemja og Arktis-avtalan

Verjusemjan, sum nú er, fer úr gildi við árslok 2023. 28. juni 2023 varð nýggj verjusemja gjørd fyri 2024-2033. Felags grundarlag er gjørt millum Grønland, Føroyar og Danmark fyri viðurskifti viðvíkjandi Arktis og Norðuratlantshav í verju-semjuni. Felags grundarlagið greiðir í høvuðsheitum frá málinum um at varðveita Arktis og Norðuratlantshav sum lágspenningarøki samstundis við, at innrásin hjá Russlandi í Ukraina verður viðurkend sum eitt verju- og trygdarpolitiskt umskifti. Í felags grunardlagnum er semja um at seta eftirlitsumbøting og yvirvaldshondhev-jan í økinum í miðdepil, umframt at uppgávuloysn hjá  nær sameindum og NATO í Arktis og Norðuratlantshavi skal stuðlast. Har-umframt er semja um, at grøn-lendsk og føroysk luttøka í viðkomandi altjóða verjupolitiskum støðum í altjóða venjingum verður gjølligari umrøtt. Avgerð verður tikin um ítøkilig ítøk og megi í partavtalum, sum samráðast skal um frá á heysti 2023 og fram. Stjórnin fer at hava Naalakkersuisut og Landsstýrið nær uppi í teimum samráðingum, ið viðvíkja Grønlandi, Føroyum, Arktis og Norðuratlantshavi.

Í sambandi við Arktis-megispakkan eru tað gjørdar einskildar avtalur við Grønland og Føroyar um ta megi, ið verður grundað teimum báðum pørtunum av Kongsríkinum, undir hesum m.a. ein loftávaringarradari í Føroyum og ein her-naðarlig og tilbúgvingarlig støðisútbúgving í Grønlandi. Væntað verður, at fyrstu næmingarnir verða upptiknir á útbúgvingina mitt í 2024. Arbeiðið við at uppseta loftávaringarradaran í Føroyum fer fram í karminum um verkætlanina við at upps-eta tveir slíkar radarar í Danmark og í samstarvi við Føroyar.

Í verjusemjuni, sum er, er peningur settur av til upprudding eftir undanfarna amerikanska hernaðarhjáveru í Grønlandi. Uppgávan verður eftirmett 2023 við atliti til m.a. greiðu á komandi tørv. Í 2023 er harafturat ein ”Yvirskipað ætlan fyri handfaring av oljudálking í Grønadali” sett í verk. Ætlanin er gjørd í tøttum sam-skifti við grønlendsku myndugleikarnar, og arbeiðið fer at fevna um eitt áramál.

#### 3.1.2 Altjóða samstarv

Stórveldakappingarstríð setir í størri mum dám á trygdar-politiska huglagið í Arktis

og Norðuratlantshavi, og innrásin hjá Russlandi í Ukraina hevur havt stórar avleiðingar fyri møguleikarnar fyri altjóða samstarvi í økinum.

Verjumálaráðið samstarvar við myndugleikar hinum arktisku ríkjunum í Arktisráði og Arctic Coast Guard Forum (ACGF). Samstarvið í Arktisráði fer fram í arbeiðsbólkinum Emergency Prevention Preparedness and Response (EPPR), sum ásetur politik og leiðreglur, umframt at býta royndir innan havumhvørvisøki. Verjan við Arktiskum Heryvirvaldi luttekur í ACGF, ið er eitt óheft og óformligt skipanar-samstarv millum arktisku bjargingartænasturnar við høvuðs-denti á leiting, bjarging og havumhvørvi. Noreg hevur for-mansskapin í ACGF 2023-2025. Samstarvið við Russland í Arktisráði (EPPR og ACGF) er fyribils strikað orsakað av krígnum í Ukraina. Russiskur formansskapur í Arktisráði og ACGF í tíðarskeiðnum 2021-2023 hevur havt avmarkað virkni teimum báðum felagsskapinum við sær. Bólkurin av arktiskum londum minus Russland hevur tó varðveitt sam-bandið og fremur við ávís høvi ymist uttan russiska luttøku.

Vejuovastin hittir so at siga árlig starvsfelagarnar úr arktiskum NATO-londum (og arktiskum NATO-felaga-londum) í tí sonevnda Arctic CHOD-format (Arctic Chiefs of Defence). Seinasti fundur var í september 2023. Fundirnir bera dám av kunningarskiftinging, sjálvt um tað tó er sædd ein flutningur móti einum meira skipaðum samstarvsstaði.
Verjan hevur ein samskiftisheryvirmann í útivist í skipanar-ligu høvuðsstøðini hjá norsku verjuni í Bodø. Harumframt verður í 2023 ein samskiftisheryvirmaður sendur til skipanar-ligu høvuðsstøðina hjá kanadisku verjuni, har persónurin skal arbeiða við arktiskum viðurskiftum.

Á politiskum stigi sæst frá mongum arktiskum ríkjum í vaksandi mun eftirspurningur eftir samskipan og kunningar-skifti á verjumálaráðharrastigi um arktisk viðurskifti. Væntað verður, at politiska skiftingin á verjuøkinum eisini fer at hava við sær, at Landsstýrið og Naalakkersuisut alsamt fara at verða tikin meir og meir upp í hetta komandi árini.

Arktiskir spurningar verða eisini umrøddir innan karmarnar av norðurlendska verjusamstarvinum (NORDEFCO) við Ís-landi, Finnland, Noregi og Svøríki við atliti til broyttu hóttanarstøðuna. Við NATO-limskapinum hjá Finnlandi, og tí komandi hjá Svøríki, stimbrast verjusamstarvið í NORD-EFCO við denti á NATO. Tað merkir m.a., at politiska sam-skiftið, tað skipanarliga og útbúnaðarsamstarvið stimbrast í Norðanlondum, so tað er tillagað verjupolitisku støðuni.

## 3.2 Veðurlag

Í 2023 útgav ST-veðurlagsnevndin, IPCC, síðsta og saman-dragandi partin av sættu høvuðsfrágreiðingini, ið bæði sam-andregur vísindini um alisligu veðurlagsbroytingarnar, av-leidda árinið og tillagingarmøguleikarnar, umframt útlát og tálman. Frágreiðingin leggur m.a. dent á, at við øktari upp-hiting økist vandin fyri, at verur doyggja út og lívmargfeldið í arktiskum vistskipanum verður hótt, serliga verur, ið liva á og nær havísinum. Burturbræðingin á Innlandsísi Grønlands heldur fram, sjálvt um framtíðarliga upphitiningin verður avmarkað í samsvari við París-sáttmálan. Burturbræðingin – og við tí sjóhæddarvøksturin – økist so hvørt sum alheims-fevnda upphitingin økist. Við alsamari alheimsfevndari upp-hiting upp á 2-3 oC verður væntað, at Innlandsísur Grønlands næstan fullkomiliga hvørvur, so tað ikki vendst aftur. Sjálvt um tað fer at taka túsundáraskeið, áðrenn fullkomiliga bræðingin fer fram, fer tað sum frá líður at hava við sær sjey metra alheimsfevndan sjóhæddarvøkstur.

Í Arktisráði er samstarvið um tálman og meting um veðurlagsbroytingarnar savnað í arbeiðsbólkinum Arctic Monitoring Assessment Program (AMAP) við hugskotsgávu og samstarvi við m.a. Conservation of Arctic Flora and Fauna

(CAFF). Seinasta veðurlagsvísindaliga dagføringin hjá AM-AP undirstrikar m.a., at viðburðir við kuldabylgjum upp á meira enn 15 dagar eru nærstan ókendir í Arktis síðani túsundaldaskiftið, og at ein minkað ísútbreiðsla og avkaving á landi og sjógvi hevur grundleggjandi broytingar í vist-skipanini við avleiðingum fyri ko-levnisringrásina og vak-strarhúsgasupptøku við sær.

Á granskingartiltaksgoymsluni 2023 varð aftur givin játtan til Nationalt Center for Klimaforskning (NCKF) fest í Dan-marks Meteorologisk Institut (DMI). Arbeiðið hjá NCKF m.a. granskingarverkætlanir um framskrivningar av broytileik-anum í veðurlagnum komandi tíggjuáraskeiðini, umframt hvussu upphitingin kann ávirka streymar, ískápur og vandan fyri vandamikil støkkmark. Vitanaruppbyggingina stuðla longu veðurfrøðiligu dáturøðirnar hjá DMI. DMI innsavnar tær gjøgnum sítt kanningarnet í Grønlandi og sínum ventrarhavískanningarstøð í Qaanaaq. Veðurfrøðiligu kann-ingardáturnar, veðurlagsdáturnar, umframt forsagnardátur frá veður- og sjómyndlar hjá DMI fyri Grønland eru latin leys at undirstuðla grøna umlegging, nýmenning og vøkstur í Grønlandi. Veðurlagstíðarrøðir grundaðar á fylgisveina-mátingar verða nýttar til langskygdar kanningar av árininum av veðurlagsbroytingunum í og kring Grønland og við Før-oyar. Eitt rað dátum frá mátingum og myndlum verður sýnt fram á polarportalen.dk, sum er eitt samstarv millum DMI, GEUS og DTU.

Á granskingartiltaksgoymsluni varð 2023 givin játtan til Program for Monitoring of the Greenland Ice Sheet (PRO- MICE) og Greenland Climate Network (GC-Net) fest í De Nationale Geologiske Undersøgelser for Grønland og Danmark (GEUS) í samstarvi við ASIAQ Greenland survey. PROMICE hevur eftirlit við burturbræðingini við breddan av Innlandsísi Grønlands við mátestøðum á ísinum og fylgisveinaeftirliti. GC-Net er eitt net av mátistøðum á innara parti av Inn-landsísinum, sum varð stovnað fyri um 30 árum síðani sum liður í veðurlagsgran-skingarætlanini hjá NASA/-National Science Foundation (NSF). Í samanspæli millum GC-Net og PROMICE er tað gjørligt at uppseta ein samlet mongdar-jav-na fyri Innlandsís Grønlands. Seinasta kanning vísir, at Innlandsísurin, bert við støðuni, sum er, við vakstrar-húsgassútláti, er so langt úti av javna, at tað fer at hava minst 27 cm hækking í alheimsfevndu sjóhæddini við sær, áðrenn javni er íafturkomin.
Veðurlagsgransking í Arktis veitir somuleiðis dátu og vitan til, at ráðlegging og átøk í mun til veðurlagsbroytingar og veðurlagstillaging kunnu fremjast á best møguliga grundar-lagi.

### 3.3 Umhvørvis- og veðurlagsstuðul til Arktis (DAN- CEA-ordning, sum var)

Umhvørvisstuðulin og Veðurlagsstuðulin, ið ávikavist Umhvørvisstýrið og Orkustýrið fyrisita, fíggja ein munandi part av langskygdu umhvørvis-, náttúru- og veðurlags-eftirlitsátøkum hjá Kongsríkinum í Arktis og leggur serligan dent á viðurskiftini í Grønlandi og kring Grønland og er ein berandi máttur í arktiska umhvørvis-, náttúru- og veðurlags-arbeiðnum hjá Kongsríkinum.

Umhvørvisstuðul til Arktis stuðlar fyri ein part átakið hjá Kongsríkinum undir ar-beiðsbólkinum hjá Arktisráði, AMAP, um broytingar og ávirkanir í vistskipanunum, undir tí alheimsfevnda dálking við illa niðurbrótiligum lívrunnum umhvørviseitri (persistent organic pollutants (POP'er)), tung-málmi, plasti og erplasti, geislavirk-ni, sót osfr., fyri annan part átakið hjá Kongsríkinum undir arbeiðsbólkinum CAFF, undir tí Circumpolar Biodiversity Monitoring Programme (CBMP), umframt átøk í arbeiðsbólkinum Protection of the Arctic Marine Environment (PAME).

Veðurlagsstuðul til Arktis stuðlaði 2023 m.a. mangar langskygdar eftirlitsætla-nir, ið nágreina veðurlagsbroyting-arnar og árinið hjá teimum, við samanlagt 18,5 mió. kr. Átøk-ini verða framd í samstarvi millum grønlandskar og danskar gran-

skingarstovnar. Úrslitini av átøkunum síggjast í vísinda-ligum yrkisfelagamettum tíðarritum, veðurlagsarbeiðum hjá Arktisráði og eru frítt atkomilig í dátugrunnum.

Veðurlagsarbeiðið í Arktisráði fer vanliga fram í arbeiðs-bólkinum AMAP í samstarvi við og við íkasti frá øðrum arbeiðsbólkum hjá ráðnum, og hetta arbeiðið er uppafturtikið 2023. Báðar stuðulsskipanirnar fíggja ein stóran part av vitanaruppbyggingini um veðurlags-, umhvørvis- og náttúru-viðurskifti í arktiska partinum av Kongsríkinum til Grønland, Føroyar og Danmark at brúka og sum íkast til alheimsfevndu og økisligu veðurlags-, umhvørvis-, og náttúrusamstørvini.

### 3.4 Umhvørvi og náttúra

Arktiska náttúruverndin skal síggjast í sammanhangi við siðbundnu náttúrutilfangistroytanina í Arktis, so sum fiski-vinnutilfangi og sjósúgdjór. Tað er miðdepilin hjá Grønlandi og Føroyum, sum hava myndugleikan á náttúru- og um-hvørvisumsitingarøkinum hjá hvørjum sær undir fyriliti til tær skyldur, ið eru avleiddar av altjóða avtalum, sum er bindandi fyri Kongsríkið.

### 3.4.1 Umhvørvissamstarvið í Arktisráði

Gjøgnum arbeiðið í AMAP hevur Kongsríkið latið vitan um alheimsfevnandi dálking sum POP'ar, tungmálm, plast og erplast, geislavirkni og sót. Tíðarrøðir og dátu í mong ár hava verið við til at stimbra alheimsfevnandi og økisligar broytingar sum Minamata-sáttmálin um líðandi at lata manna-skaskapt kyksilvur hvørva m.a. gjøgnum eina nýggja eftirlits-ætlan og til Stokkhólm-sáttmálin um líðandi at lata POP-samanbindingar hvørva. Kongsríkið hevur saman við Kanada leitt arbeiðið viðvíkjandi árininum av veðurlagsbroyt-ingunum á ávirkanina av alheimsfevnandi dálkingini í Arktis og á ta framhaldandi dálkingina av arktiskum vistskipanum serliga frá POP'um og kyksilvuri og serliga í sjósúgdjórum. Í tí sambandi eru fýra støðisfrágreiðingar útgivnar 2022, sum hjálpa til m.a. at skilja evnanna ávirkan á sjóvistskipanir og heilsuávirkan á serliga barnakonur og børn.

Kongsríkið er harumframt í samstarvi við Kanada við at enda eina nýggja ritgerð um at kortleggja staðbundnar dálkingarkeldur í Arktis mótvegis dálking frá alheimafatandi keldum.

Ein AMAP-frágreiðing frá 2021 um sótdálkingina í Arktis skjalprógvar framhaldandi stórar nøgdir av sót, men dál-kingarminking av svávulhavnum samanbindingum. Eftirlitið við sót, metani og øðrum stuttlivaðum veðurlagstilfarsliðum heldur fram í Arktis, og Kongsríkið fer at lata nýggja vitan til eina komandi frágreiðing. Í IMO-høpi arbeiðir Kongsríkið fyri at minska sótútlátið í Arktis, við fyriliti at búskaparligu avleiðingunum fyri grønlandska samfelagið og vinnuáhuga-mál.

Kanada hevur 2023 vent sær til Danmark og Grønland við atliti at fáa stuðul til eitt ECA (Emission Control Area) í Arktis millum Grønland og Kanada. Kanadiska ECA hevur verið umrøtt millum Grønland, Danmark og Kanada. Samsvarandi hevur Portugal síðani á heysti 2022 arbeitt fyri at fáa í lag eitt ECA í Landnyðringsatlantshavi frá Marokko til Grønland. Uppi í arbeiðinum eru tey lond, ið væntast at hava mark til ECA'ið. Talan er um Portugal, Spania, Frakland, Bretland, Írland, Ísland, Grønland, Føroyar og Danmark. Samráðst verður framhaldandi um bæði ECA'ini 2023-2024.

Kongsríkið hevur harumframt verið við í eini arktiskari eftirlitsætlan viðvíkjandi plasti og erplast umframt eftirlits-leiðreglum, sum undirstuðla staðbundnu virkisætlanina um sjóburturkast hjá PAME, og sum eisini er íkast til aðrar staðbundnar og altjóða felagsskapir, undir tí ein nýggj al-heimsfevnandi ST-avtala um plast, sum væntst liðugt sam-rádd 2024. Kongsríkið luttekur eisini í nýggjati ritgerð saman við Kanada og Noreg um at kortleggja neiligu avleiðingarnar av plasti og erplast í arktiskum djórum.

Samstarvið um at skipa og verja sjóumhvørvið er mið-savnað í arbeiðsbólkinum PAME. Kongsríkið hevur í 2023-2025 leiðsluna í PAME. Undir leiðsluni fer Kongsríkið at leggja dent á at hava eitt vistskipanargrundað sjónarmið og serliga raðfesta  undirsjóaróljóð, innræsin djór og vard hav-øki, umframt onnur lítarliga økisgrundað verndarframtak (Other Effective Area-Based Conservation Measures). Mong av hesum átøkum hava í sær samstarv við CAFF.

Sum ein partur av arbeiðsætlanini hjá PAME er vegleið-ingin til at verkseta eitt vistskipanargrundað sjónarmið í at umsita arktiska havvistskipanir undir endurskoðan. Mong bólkakjak og ráðstevnur hava verið hildin, ið hava verið við til at leggja dent á ítøkiliga verkseting av vistskipanar-grundaðari umsiting av Arktis.

### 3.4.2 Lívmargfeldissamstarvið í Arktisráði

Lívmargfeldissamstarvið í Arktisráði er savnað í arbeiðs-bólkinum CAFF, har Grønland hevur leiðsluna 2023-2025. CAFF hevur trý raðfest øki, har fyrsta økið er havið sum eitt tvørfevnt evni í samstarvi við PAME m.a. við denti á tey nýggju alheimsfevndu málini undir Lívmargfeldissátt-málanum (hetta er somuleiðis ein raðfesting hjá norsku leiðsluni í Arktisráði).

Annað økið er vitanaruppbygging, undir tí trygging av at taka vitan hjá upprunafólki um støðu og hugrák í sambandi við arktisku náttúruna, og triðja økið snýr seg um taka upprunafólk við, eisini ung. Kongsríkið hevur í leiðslu-toyminum tikið ung við, sum luttaka í viðkomandi fundum og hugsast at hava ein lut í nýggjum verkætlanarítøkum.

Arbeiðið í CAFF gevur m.a. íkast til arbeiði hjá Kongs-ríkinum á alheimsfevnandi støðum at umrøða náttúruvernd og raðfestir í tí eina nýggja skynsama ætlan. Somuleiðis leiðir Kongsríkið enn CAFF's Circumpolar Biodiversity Monitor-ing Programme (CBMP) saman við USA og gjørdi 2021 eina mannagongd viðvíkjandi lívmargfeldiseftirlitinum í Arktis fyri tíðarskeiðið 2021-2025.

CBMP/CAFF hevur 2022 m.a. lagt dent á arktiska lívmarg-feldið á landi. Arktiski vøksturin er stórliga broyttur, mong skordýr, fuglar og súgdjór eru undir trýsti, og øktur vandi er fyri vistskipanarbroytingum og nýggjum órógvi sum til dømis náttúrueldar við meinum avleiðingum fyri náttúru og menniskju. Í 2022 er arbeitt víðari við at finna møguligar til-lagingar, m.a. gjøgnum fyrisitingarframtøk. Harumframt arbeið-ir CBMP/CAFF víðari við dagføringum um støðuna hjá arktiska sjólívmargfeldinum.

Kongsríkið leiðir tvær verkætlanir tongdar at samstarvinum millum CAFF og PAME. Onnur verkætlanin snýr seg um innræsin dýr og fara nágreina, hvørji innræsin sjódýr, ið eru skrásett í Arktisklondum higartil og gera eina váðameting av víðari útbreiðslu við skipum við barlastvatn og á skrokkum, undir tí eisini í sambandi við veðurlagsbroytingar í framtíðini. Verkætlanin er framhald av ávísum virkni í virkisætlan hjá Arktisráði um innræsin dýr (Arctic Invasive Alien Species (ARIAS)). Hin verkætlanin snýr seg um verndarhavøki (Mar-ine Protected Areas (MPA)) og af skifta royndir millum Arktislond um onnur munagóð økisgrundað verndartiltøk. Í 2022 er fígging útvegað til at hava eitt altjóða bólkakjak í 2024 um OECM, sum Kongsríkið leiðir saman við USA og Kanada.

Harafturat dugnar Kongsríkið einari PAME-verkætlan, sum hevur til endamáls at kortleggja virkni á havi og nær strandum viðvíkjandi námsvinnu, undir tí burturkastvarð-veitsla og -útlát og námsspillvatnsfrárensl til havumhvørvið. Verkætlanin fer at geva eitt yvirlit yvir arktisku strandar- og havnáms-raksturvirkni, sum eru, við atliti til at eyðmerkja og meta um ta virkisroynd, ið er at burturveita framleiðsluavlop.

### 3.4.3 Umhvørvisvernd á sjógvi og landi

Kongsríkið er partur í Lívmargfelsissáttmálanum, og arbeiðið í Arktisráði (arbeiðsbólkunum CAFF og PAME) un- dirstuðla, at sáttmálaarbeiðið verður verksett. Partarnir í sáttmálanum samtyktu nýggj alheimsfevnd náttúrumál og ein karm um arbeiðið (post 2020-karmurin) á 15. partaráðstevnu (COP15), sum varð hildin í desember 2022 í Kanada. CAFF og PAME samstarva m.a. um eina verkætlan um onnur munagóð økisgrundað verndartiltøk, ið kunnu vera við til at verkseta eitt alheimsfevnt náttúrumál upp á 30 % vard havøki.

Í virkisøki hjá Lívmargfeldissáttmálanum arbeiðir Kongs-ríkið fyri at styrkja, sameina og tryggja rættindi hjá uppruna-fólkum, undir tí tað ið viðvíkir luttøku hjá upprunafólkum, umframt at tryggja atlitið til og virðingina fyri vitanina hjá upprunafólkum og vitanina hjá nærsamfeløgum, og at hetta skal fara fram sam-bært sjákvráddu, kunnaða og undanfarna samtykki hjá upprunafólkum í samsvari við UNDRIP (Yvirlýsing om rættindi hjá upprunafólkum hjá ST).

Kongsríkið er harumframt partur í havsáttmálanum OS-PAR (Convention for the Protection of the Marine Envir-onment of the North-East Atlantic). Danmark er sendi-nevndarleiðari vegna Kongsríkið. OSPAR hevur sett ein ser-arbeiðs-bólk (Arctic Outcomes Working Group (AOWG)) til at gera arbeiðið hjá OSPAR við denti á verndarátakið í sambandi við arktiska partin av OSPAR-økinum. Her luttaka umboð úr Grønlandi og Danmark. Fyrsta bólkakjakið hjá arbeiðsbólkinum heldur Grønland 16.-18. oktober 2023 á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmanna-havn.

Kongsríkið hevur virkið luttikið í arbeiðnum hjá ST við eini løgbindandi eykaav-talu til havrættarsáttmálan hjá ST um at verja og burðardygt troyta lívmargfeldi í havi uttan fyri tjóðskaparliga lógsøgn (Biodiversity Beyond National Jurisdiction (BBNJ-aftalen)). Eykaavtalan varð samtykt í ST 19. juni 2023, og stjórnin hevur síðani avgjørt, at Danmark skal undirskriva avtaluna og seta hana í gildi.

Grønland og Danmark eru júst nú við at verkseta eitt forboð frá siglingar-felagsskapinum hjá ST móti at brúka tunga olju sum skipsbrennievni í serbúska-parøkinum við Grønland. Danmark ger í tí sambandi eitt lógaruppskot, ið skal til viðgerðar í Inatsisartut og setast fram í Fólkatinginum í Dan-mark.
Harafturat er Kongsríkið við í nýggjari vitan um alheims-fevnd dálkingarevni í Arktis av ávikavíst illa niðurbrótiligum lívrunnum samanbindingum íroknað PFAS, kyksilvur og slíkt til alheimsfevndu evnasáttmálarnar Stokkhólm-sáttmál-an og Minamata-sáttmálan og til annað staðbundið samstarv.

### 3.5 Landgrunsverkætlanin

Sum eisini lýst í Arktiskari frágreiðing 2022, har Kongs-ríkið í tíðarskeiðnum 2009- 2014 latið skjalfesting (partfram-løgur) til Nevnd fyri landgunsmørk hjá ST (CLCS) um land-grunsvíðkan á fimm økjum. Tey fimm økini eru: Trý við Grøn-land og tvey við Føroyar, undir tí økið við Norðpólin. Tey verða viðgjørt hvørt fyri seg í CLCS, ið eftir lokna við-gerð gevur tilráðingar. Um tað eftir tilráðingum frá CLCS enn eru umskarandi krøv til grannalond, fer endaliga avmarkingin at koma til politiskar samráðingar millum londini. Kongsríkið leggur – heilt í samsvari við Ilulissat-yvirlýsingina – stóran dent á samskifti og beinleiðis samráðingar millum viðkom-andi ríki bæði í mun til tøkniligar jarðyrkisligar spurningar og í mun til spurningar viðvíkjandi avmarking av umskarandi landgrunskrøvum.

CLCS hevur fyribils givið eina tilráðing viðvíkjandi part-framløgu norðan fyri Føroyar. Landgrunnurin hjá Kongs-ríkinum umskarast í hesum øki við landgrun-nar hjá ávikavíst Noregi og Íslandi. Eftir samráðingar undirskrivaðu partarnir í Stokkhólmi 30. oktober 2019 býtingaravtalur viðvíkjandi øki-num, og Fólkatingið gav sítt samtykki eftir § 19 í Grundlógini 25. mai 2021.

### 3.6 Markseting millum Grønland og Kanada

Fyri at meiri framgongd í spurningar um markseting oa. á havleiðini millum Grønland og Kanada settu Uttanríkis-málaráðið saman við Naalakkersuisut og stjórnini hjá Kana-da, í sambandi við 10 ára hátíðarhaldið fyri Ilulissat-yvir-lýsingi-na í 2018 ein felags arbeiðsbólk, sum skuldi hyggja gjølligari eftir marknaviður-skiftum á havleiðini millum Grøn-land og Kanada, sum ósenja var um.
Orsakað av trátøknum samráðingum undirskrivaðu Jeppe Kofod uttanríkis-málaráðharri, Múte B. Egede formaður Grønlands í Naalakkersuisut og Mélanie Joly uttanríkis-málaráðkvinna Kanada 14. juni 2022 en heildaravtalu, ið ber í sær, at Tartupaluk (Hansoy) verður býtt. Avtalan nútíðarger harafturat ta galdandi mar-knaavtaluna frá 1973 og setir sjómarkið í Lincolnhavi innan fyri 200 sjómíl. Haraft-urat verður landgrunsmarkið sett út um 200 sjómíl í Labradorhavi.

Sáttmálin kemur í gildi, tá partarnir skrivliga hava kunnað hvør annan um, at neyðugu innlendis mannagongdirnar eru framdar. Fyri Danmark viðvíkjandi ber tað í sær, at Fólka-tingið skal samtykkja tað sambært § 19, stk. 1 í Grundlógini. Fólkatingssamtyktin fæst við, at uttanríkismálaráðharrin setir fram uppskot til samtyktar tí viðvíkjandi. Uppskotið til samtyktar verður væntandi framsett á heysti 2023. Avtalan er einmælt góðkend í Inatsisartut 31. mai 2023. Kanada hevur upplýst, at stig eru tikin móti góðkenning, men at ein verulig góðkenning tó fer at bíða eftir felags skilning um verkseting viðvíkjandi landamarkinum og tí komandi broytingini av marknaviðvíktu reglubindingini hjá Kanada.

### 3.7 Sigling og siglingartrygd

Siglingarfelagsskapurin hjá ST (IMO) Pólkota hevur til endamáls at økja siglingartrygdina á arktiskum farleiðum og setir serlig krøv til skipaútgerð og -skapgávu umframt mann-ingavenjing við atliti til at megna teir serligu váðunum í sam-bandi við sigling á ísfyltum farleiðum. Pólkotan inniheldur harumframt reglur fyri umhvørvisvernd í viðkvæmu náttúruni í Arktis.

Siglingarstýrið hevur arbeitt við at víðka partar av Pól-kotuni til at fevna um før, eitt nú fiskiskip, lítil farmaskip (bruttoburðarorka undir 500) og stuttleikafør, ið ikki verða brúkt handilsliga. IMO samtykti endaliga Pólkotu-víðkanina á nevndarfun-di í mai 2023. Endamálið við víðkanini er at økja trygdina á sjónum á arktiskum leiðum við at fáa breiðari nýtslu av pærtum av Pólkotuni.

Harafturat leggur Siglingarstýrið serligan dent á at halda Pólkotuna gjøgnum fyribyrgjandi eftirlit serliga fest á reikferðaskip bæði innan sigling á grønlandskum havleiðum og eftirlit framt í Grønlandi. Átakið skal vera við til at halda trygdina í sambandi við øktu siglingina við reikskipum á ísfyltu havleiðunum kring Grønland. Til nýtslu í arbeiðnum í IMO fastleggur Danmark áhaldandi støður í samskifti við bæði Grønland og Føroyar. Føroyar har harumframt atknýttan limaskap í IMO og lutaka í egnum navni.

DMI rekur veðurtænastu í Grønlandi, ið boðar frá vanda-veðri og ger veður-for sagnir og havleiðsforsagnir fyri alt Grønland og havið har á leið. Sambært til Chicago-sátt-málanum veitir veðurtænastan hjá DMI sivilari loftferðslu ávaringar og forsagnir. DMI hevur síðni 2022 boðað grøn-lendsku myndugleikunum frá ódn, stormi og svartakálki og er í oktober 2023 komin við boðum til borgarararnar í Grøn-landi. Harafturat hevur DMI sett í gangd eina royndar-verkætlan um at geva boð um skalvalop. Bæði veður-forsagnir, veðurkunning og boð verða givin á grønlendskum. Sambært SOLAS-sáttmálanum (”International Convention for the Safety of Life at Sea”) fevnir ístænastan hjá DMI um skipaferðsluna á grøn-lendsku havleiðunum. Bæði dagliga framleiðslan og tað at menna nýggj sløg af ískunning fer fram í tøttum samstarvi við ístænastur í USA, Kanada og Noregi

umfamt Copernicus Marine Services. DMI veitir eisini Ark-tisku sjóverju veðurfrøðilig dátu og ráðgeving, undir tí kunn-ing um ísstøðuna í arktiskum øki.

### 3.8 Sjókort og havbotnskortlegging

Ein týðandi fortreyt fyri sigling og siglingartrygd í Arktis er álítandi sjókort. Jarðdátustýrið (GST) umboðar Kongs-ríkið í Altjóða vatnfrøðiliga felagsskapinum (IHO) og í stað-bundnum nevndum og arbeiðsbólkum hjá IHO. Arctic Regio-nal Hydrograpic Commission (ARHC) er arktiska stað-bundna nevndin, ið umfatar londini USA, Kanada, Noreg, Ísland, Danmark og Russland. Samstarvið við Russland er í løtuni strikað. Høvuðsendamálið hjá Nevndini er at tryggja samskipan millum vatnfrøðiligu skrivstovurnar hjá einstøku londunum fyri á tann hátt at tryggja best gjørligu einsháttan viðvíkjandi sjókortum, havuppmáting og onnur viðkomandi øki, sum t.d. at verkseta nýggja alheimsfevnandi standilin fyri havdátu og framleiðsl-ur (S-100) og at gera einsháttað dátuundirstøðukervi til hav-dátu.

Frá september 2022 til september 2023 hevur GST verið formaður í ARHC. Formansskeiðið endaði við árligu ARHC-ráðstevnuni, sum GST skipaði fyri í Nuuk, har vatnfrøðingar og havserfrøðingar frá arktiskum londum vóru komnir saman. Á ARHC-ráðstevnuni samdust limalondini um at leggja meiri dent á at verkseta S-100 í Arktis, nýggja altjóða dátustandilin fyri havdátu, umframt á samstarv og førleikauppbygging viðvíkjandi tí at nýta fylgisveinamyndir sum kortleggingar-amboð. Harafturat varð ARHC samt um uppaftur meira at styrkja samstarvið við arbeiðsbólkarnar hjá Arktisráði, PA-ME og EPPR (Emergency Prevention, Preparedness and Re-sponse) umframt Arctic Spatial Data Infrastructure (SDI) fyri at undirstyðja arbeiðið hjá Arktisráði viðvíkjandi veðurlags-broytingum og havumhvørvisvernd í Arktis.

Í september 2023 hevur ARHC sum liður í einum áhaldandi arbeiði at kortleggja arktiskar havleiðir lítarligari harafturat almannakunngjørt frágreiðingina Arctic Hydrographic Risk Assessment. Frágreiðingin inniheldur eina greining av skipa-ferðslu, vatnfrøðiligari dátudygd og dýpdardátum fyri at stað-binda øki við møguliga váðamiklari sigling.

### 3.9 Kortlegging og talgilt undirstøðukervi til arktiskar landafrøðiligar dátur

Dátu og korttænastur og talgilt undirstøðukervi, sum hoyrir til, hevur stóra týdning fyri samfelagsmenningina í Arktis. Stýrið fyri Dátuveiting og Undirstøðukervi (SDFI) endaði eina nýggja kortlegging av Grønland í opnum landi (partur av landi uttan fyri býirnar og bygdirnar) við árslok 2022.

SDFI samstarvar við kortleggingarmyndugleikarnar hjá hinum arktisku londunum um talgilda undirstøðukervið til landafrøðilig dátu við denti á at undirstuðla, at arktisk dátu, ið m.a. eru uppbygd í arbeiðsbólkum hjá Arktisráði, verða útbreidd og endurnýtt. Orsakað av, at Russland gjørdi innrás í Ukraina hevur Arctic SDI-samstarvið síðni mars 2022 verið minkað til verkætlanarvirksemi uttan, at Russland hevur verið við og fylgir leiðreglunum fyri samstarvi í Arktisráði.

SDFI hevur ábyrgdina av at reka GNET (GNSS Grønlands (Global Navigation Satellit System) net). Við 61 støðugum mátistøðum er GNET tað grundleggjandi landmátingarliga undirstøðukervið í Grønlandi, sum tryggjar álítandi jarðdátu m.a. til at nýta í sambandi við munagott veðurlagseftirlit við mongdini á Innlandsísinum umframt yvirvaldshandhevjan.

### 3.10 Mineralsk ráevni

Útvinning av mineralskum ráevnum er ein handilsligur møguleiki hjá Grønlandi. Vitan og dátu eru eitt týðandi amboð hjá náms- og mineralídnaðinum í

tí sambandi. GEUS stendur í samstarvi við Naalakkersuisut fyri jarðfrøðiligari kortlegging og jarðdátugrunnum viðvíkjandi Grønlandi, sum styðja kanningarfeløgum við granskingargrundaðari vitan um jarðfrøðina í Arktis og tað hartil knýtta mineraltilfangið. SDFI sterdur fyri at veita dagførda staðfrøðiliga grundarlagið fyri jarðfrøðiligu kort-unum.

### 3.11 Gransking

Gransking er ein týðandi partur av støðinum undir arktisk-um samstarvi og skapar grundarlagið undir týdningarmiklum politiskum avgerðum um burðardygga menning og umhvørvi í Arktis. Viðmerkjast skal, at Grønland 2022 almanna-kunngjørdi tjóðarligu granskingarætlanina fyri 2022-2030 (”Gransking – Vegurin til framdrátt”) við m.a. denti á burðar-dygga samfelagsmenning. Harafturat skal viðmerkjast, at Føroyar 2022 almannakunngjørdu sjónarmiðsskjalið ”The Faroe Islands in the Arctic”, sum m.a. snýr seg um týdningin av gransking og vísindum fyri Arktis.

#### 3.11.1 Gransingaravtalan

Tey átta arktisku ríkini umframt Grønland og Føroar undir- skrivaðu 2017 eina løgbindandi avtalu um stimbrað gran-skingarsamstarv í og um Arktis. Avtalan skal undirstuðla samstarv og fríari smidleika fyri granskarar, granskingútgerð o.m. tvørtur um arktiska økið. Danmark fylgir støðugt verk-setanina av granskingaravtaluni gjøgnum árligu fundirnar og samskifti við avtalupartarnar. Av tí, at avtalan umfatar Russland, hevur støðgur verið í samstarvinum síðani mars 2022.

#### 3.11.2 Altjóða arktisku miðdepil

Altjóða Arktiski Miðdepilin hevur síðani 2019 verið fíggj-aður av bæði Danmark (um 3,0 mió. kr. um árið) og Grøn-landi (0,75 mió. kr. um árið) gjøgnum árligu fíggjarlógirnar. 2023 fíggjaði Danmark miðdepilin við 3,1 mió. kr. Enda-málið við miðdeplinum er at vera ein samskipandi pallur í Grønlandi fyri grønlandskar, danskar og altjóða pólgransk-arar og arktisk áhugamál.

#### 3.11.3 Pallur fyri arktiska gransking

Pallur fyri arktiska gransking (FAF) hevur síðani 2014 virk-að sum ein miðstovnur fyri arktiskt granskingarsamstarv við luttøku úr øllum týðandi granskingarstovnum í Grønlandi, Føroyum og Danmark. FAF er við til at skapa góð samstarvs-sambond millum tey virkandi innan arktiska gransking í Grønlandi, Føroyum og Danmark.

#### 3.11.4 UArctic

Arktiskt fróðskaparsetur (UArctic) er eitt net av fróð-skaparsetrum og granskingarstovnum o.ø. í arktiska økinum, ið varð fíggjað við 3,0 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2023.

#### 3.11.5 Evropiskt samstarv um arktiska gransing

2020 varð ES-verkætlanin EU-PolarNet2, fíggjað av gran-skingar- og nýmenningarsætlanini hjá ES, Horizon 2020, sum er heimsins størsta samskipan fyri arktiska serfrøði og undirstøðukervi. Verkætlanin  heldur fram til september 2024. Avloysarin hjá Horizon 2020, Horizon Europe, ið verð-ur í tíðarskeiðnum 2021-2027, inniheldur sum heild nakrar fígjanarmøguleikar fyri forskellige liðir av arktiskari gransk-ing.

### 3.11.6 Felagsskapurin hjá danska kongsríkinum fyri rúmi í Arktis

Útbúgvingar- og Granskingarmálaráðið hevur tikið stig til, at tað sum liður í stovna eina røð av tjóðarligum rúm-felagsskapum eisini verður sovnaður ein Felagsskapur fyri rúm í Arktis. Tá felagsskapurin varð stovnaður í desember 2020 vóru tað 26 felagar í felagsskapinum býttir út á tríggjar grønlandskar, tríggjar føroyskar og 19 danskar umfram ein eygleiðara (danskan).

### 3.11.7 Nýtt granskingarskip

Við avtaluni um at býta granskingartiltaksgoymsluna o.a. 2021 vórðu avsettar 169,1 mió. kr. í tíðarsskeiðnum 2021-2023 til partvís at fíggja eitt nýtt margnýtt granskingarskip til Norðuratlantshav, "DANA V". A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal og Orient's Fond hava hvør latið 50 mió. kr. til skipið. Dan-markar tøkniliga fróðskaparsetur, DTU, hevur ábyrgdina av útbjóðingini og skipagerðini. Granskingarskipið verður vænt-andi liðugt 2027. Sniðgávutíðarskeiðið verður væntað liðugt 2023.

### 3.11.8 Stimbrað arktisk gransking og havgranskingarætlan

Í avtaluni um granskingartiltaksgoymsluna 2023 vórðu av-settar 34,8 mió. kr. til at stimbra arktiska gransking. Av teimum fóru um 30 mió. kr. úr Danmarks Frie Forskningsfond í virkisøkinum hjá Nordforsk.

Granskingarætlanin um havgransking í Norðuratlanshavi (2020-2023) fer til Granskingarráð Føroya. Ætlanin, ið var fíggjað við um 27,5 mió. kr. 2020-2023, varð longd við 7,5 mió. kr. árliga 2024 og 2025. Nýggi peningurin til hav-gransking er fingin úr Norðuratlantspuljuni.

### 3.11.9 Gransking um uttanríkis-, verju- og trygdarpolitik

Tað eru avsettar 10,2 mió. kr. árini 2023-2026 til gran-skingarverkætlanir, sum grønlendskir, føroyskir og danskir granskingarstovnar hava framt við atliti til at stimbra sam-starvið um uttanríkis-, trygdar- og verjupolitik. Peningurin, sum Norðuratlantspuljan hevur latið, fer til Granskingarráð Føroya.